## Alonso nærkast Renault

Stórir trupulleikar hava í ár verið í millum Fernando Alonso og Lewis Hamilton, sum báðir koyra fyri McLaren, og tí er líkt til, at annar teirra má finna sær nýtt felag komandi ár. Og nú bendir nógv á, at verandi heimsmeistarin í Formil 1, Fernando Alonso, kann vera á veg til gamla felag sítt Renault komandi ár. – Eg havi sagt við Fernando, at í somu løtu hann er fríur frá McLaren, vilja vit fegnir geva honum gamla setrið aftur her í Renault. Hetta segði stjórin í Renault, Flavio Briatore við Gazetta dello Sport í gjár.



## Schumacher gevst í Toyota

Týski Formil 1-koyrarin, Ralf Schumacher, gevst í felag sínum Toyota eftir hetta kappingarárið. Hetta sigur hann á presónligu heimasíðu sínari. - Eftir trimum árum í Toyota eri eg klárur at møta nýggjum útfordringum. Næstu vikurnar fari eg at samráðast við onnur feløg, og so fáa vit at síggja, hvat tað endar við, sigur Schumacher. Schumacher hevur higartil koyrt 51 kappkoyringar fyri japanska felagið, men hann hevur enn til góðar at vinna sína fyrstu kapping fyri teir.

# Vónbrot og gleði í regninum

**Fyri Lewis Hamilton var sigurin søtur í truplastu koyringini, ið hann nakrantíð hevði koyrt, men fyri Fernando Alonso endaði dagurin í vónbroti, og heimsmeistaraheitið tykist tapt. Men tað var ikki bert tvífaldi heimsmeistarin, ið upplivdi vónbrot á vátu Fuji breytini, fyri 20 ára gamla Sebastian Vettel, var vónbrotið ikki til at bera**



*Bilførarin í trygdarbilinum var óvanliga nógv á breytini, ein triðingur av koyringini var aftan fyri Mercedes bilin.*
*Mynd: Polfoto*

**Heimsmeistarheitið fyri lið**

| Nr | Lið | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Ferrari | 170 |
| 2 | BMW Sauber | 92 |
| 3 | Renault | 51 |
| 4 | Williams-Toyota | 28 |
| 5 | Red Bull-Renault | 23 |
| 6 | Toyota | 12 |
| 7 | Super Aguri-Honda | 4 |
| 8 | Honda | 2 |
| 9 | Spyker- Ferrari | 1 |

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Lewis Hamilton vann eina av teimum mest sermerktu formil 1 koyringunum í nýggjari tíð, og gleddist almikið um sigurin, ið gjørdi, at Hamilton nú hevur 12 stig fleiri enn liðfelagin Alonso, og við bert tjúgu stigum eftir at kappast um, tykist heimsmeistaraheitið rættiliga tætt við at vera hansara.

### Regnaði ov illa til at koyra kapp

Fyrstu ferð í 30 ár kom formil 1 sirkusið til breytini undir Fuji fjallinum. Síðan regn oyðilegði tær báðar fyrstu koyringarnar á breytini í 1976 og 77, hava aðrar breytir verið karmur um japansku formil 1 koyringina, og í 20 ár hevur heimabreytin hjá Honda, Suzuka breytin verið almenna japanska formil 1 breytin. Men stórt lobbi virksemið, hevur havt við sær, at man Fuji í ár kom á kalendarin. Men við regnið í tíðarkoyringini leygardagin livdi Fuji breytin upp til sítt umdømi, so illa regnaði, at ein av venjingunum var avlýst, tí bjargingar tyrlan ikki slapp á flog fyri regnið. Og sjálv koyringin gjørdist eisini merkt av regnið. Fyrstu 19 umførini var trygdarbilur á breytini, og bilarnir koyrdu í eini fittari røð runt, uttan møguleika at yvirhála hvør annan. Regnið datt so tungt niður á breytina, at tað var ov vandamikið at lata bilar koyra kapp í hesum líkindunum.

### Ferrari í øðini

Lewis Hamilton hevði fyrstubyrjunarstøðuframmanfyri liðfelaganum Fernando Alonso, og teimum báðum Ferrari førarunum Kimi Räikkönen og Felipe Massa. Men báðir Ferrari bilarnir fingu boð um, at koyra inn í pittin at skifta dekk, ti teir í mun til øll hini liðini vóru byrjaðir á vanligum regnveðursdekkum ístaðin fyri dekkum til ekstremt regn, Ferrari hevði ikki fingið boðini áðrenn koyringina, og úrslitið var, at Massa og Räikkönen fóru aftur um allar hinar bilarnar. Ferrari liðið var í øðini. Men kundi eftir koyringina gleðast um, at Räikkönen við at koyra seg fram á triðja pláss enn teoretiskt er við í kappingini um heimsmeistaraheitið.

### Alonso misti HM

Tá 19 umfør vóru koyrd, var regnið eitt sindur minkað, og kappkoyringin varð sett í gongd. Hetta gjørdust 48 sera dramatisk umfør við nógvum avkoyringum og ákoyringum. Millum hesar átti Fernando Alonso fleiri, og dagurin hjá spanska heimsmeistaranum endaði við, at hann misti tamarhald á bilinum á vátu breytini, og við nógvari ferð smildraði sær bilin inn í ein vegg. Áðrenn hetta hevði hann millum annað rent saman við unga nýbyrjaða týskaran Sebastian Vettel, og júst Vettel var ivaleyst mest vónbrotni maður á breytini. Vettel lá í sínum Torro Rosso bili á odda einu løtuna, á øðrum plássi einu løtuna, og við fáum umførum eftir lá til at enda á triðja plássi í síni sættu formil 1 koyring. Við fáum umførum eftir, gjørdi Vettel eitt mistak, ið kostaði dýrt fyri bæði hann og arbeiðsgevara hansara. Trygdarbilurin var komin á breytina, tá Alonso smildraði sær bilin, og í ringa sýninum rendi Vettel á Mark Webber, ið var á øðrum plássi í sínum Red Bull bili. Úrslitið var endin fyri koyringina hjá báðum bilum. Red Bull eigur bæði liðini, og unga hetjan gjørdist við hesum lítla mistaki dagsins banditturr. Dagurin gjørdist ikki betur, tá leiðslan fyri japansku koyringina revsaáði Vettel, við at flyta hann 10 byrjunarstøður aftur í komandi formil 1 koyring.

Heikki Kovalainen koyrdi skilagott í sínum Renault bili, og fyri fyrr so nógv útskeldaða finnan var dagurin hæddarpunktið á kappingarárinum hitgartil.

**Úrslit av japansku formil 1 koyringini**

| Úrslit | Koyrari | Lið | Tíð/Givin | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Lewis Hamilton | McLaren – Mercedes | 2:00:34:579 | 10 |
| 2 | Heikki Kovalainen | Renault | + 8.3 sekund | 8 |
| 3 | Kimi Räikkönen | Ferrari | + 9.4 sekund | 6 |
| 4 | David Coulthard | Red Bull – Renault | + 20.2 sekund | 5 |
| 5 | Giancarlo Fisichella | Renault | + 38.8 sekund | 4 |
| 6 | Felipe Massa | Ferrari | + 49.0 sekund | 3 |
| 7 | Robert Kubica | BMW | + 49.2 sekund | 2 |
| 8 | Vitantonio Liuzzi | STR – Ferrari | + 55.6 sekund | 1 |
| 9 | Adrian Sutil | | Spyker – Ferrari | + 60.1 sekund |
| 10 | Rubens Barrichello | Honda | | + 88.3 sekund |
| 11 | Jenson Button | Honda | | + 1 umfar |
| 12 | Sakon Yamamoto | Spyker – Ferrari | | + 1 umfar |
| 13 | Jarno Trulli | Toyota | | + 1 umfar |
| - | Nick Heidfeld | BMW | givin | |
| - | Takumo Sato | Super Aguri – Honda | givin | |
| - | Ralf Schumacher | Toyota | givin | |
| - | Anthony Davidson | Super Aguri – Honda | givin | |
| - | Nico Rosberg | Williams – Toyota | givin | |
| - | Sebastian Vettel | STR – Ferrari | givin | |
| - | Mark Webber | Red Bll – Renault | givin | |
| - | Fernando Alonso | McLaren – Mercedes | givin | |
| - | Alexander Wurz | Williams – Toyotagivin | | |

**HM fyri koyrarar**

| Støða | Koyrari | Land | Lið | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Lewis Hamilton | Bretland | McLaren – Mercedes | 107 |
| 2 | Fernando Alonso | Spania | McLaren – Mercedes | 95 |
| 3 | Kimi Räikkönen | Finnland | Ferrari | 90 |
| 4 | Felipe Massa | Brasilia | Ferrari | 80 |
| 5 | Nick Heidfeld | Týskland | BMW | 56 |
| 6 | Robert Kubica | Póland | BMW | 35 |
| 7 | Heikki Kovalainen | Finnland | Renault | 30 |
| 8 | Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 21 |
| 9 | Nico Rosberg | Týskland | Williams – Toyota | 15 |
| 10 | Alexander Wurz | Eysturríki | Williams – Toyota | 13 |
| 10 | David Coulthard | Skotland | Red Bull – Renault | 13 |
| 12 | Mark Webber | Australia | Red Bull – Renault | 10 |
| 13 | Jarno Trulli | Italia | Toyota | 7 |
| 14 | Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 5 |
| 15 | Takuma Sato | Japan | Super Aguri – Honda | 4 |
| 16 | Jenson Button | Bretland | Honda | 2 |
| 17 | Adrian Sutil | Týskland | Spyker – Ferrari | 1 |
| 18 | Sebastian Vettel | Týskland | STR – Ferrari | 1 |